tíðindablaðið **sosialurin**
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov

**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Niclas Johannesen
**Yngd:** Jákup Mørk

**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin
**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir

**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820
**Telefax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** Sosialurin

# Eitt gott íkast

## *Oddagrein*

Ferðavinnan kastar hundrað milliónir krónur av sær um summarið. Tað vísir kanningin, sum Ferðaráð Føroya bað granskingardepilin á Bornholm gera. Hetta fyrsta útgreinaða úrslitið í kanningini er stak áhugavert, hóast vit enn ikki kenna úrslitið til fulnar.

Tá kanningarúrslitið vísir, at ferðavinnan kastar hundrað milliónir krónur av sær, so er heilt greitt, at hon kastar upp aftur meiri av sær. Eftir tíðindaskrivinum at døma, virkar ikki sum at flutningsfeløgini eru við í uppgerðini, og bæði føroysku skipafeløgini og føroyska flogfelagið leggja nakað væl eftir seg eisini. Harafturat koma óivað smærri inntøkur her og har, sum neyvan eru við í uppgerðini.

Bæði hetta greinaða úrslitið og tað, sum kom fram úr kanningini fyri einum tveimum mánaðum síðani, gevur Ferðaráðnum og ferðavinnuni nakað at arbeiða við. Vit hava nú vissu fyri, at tey stívliga 20.000 ferðafólkini á sumri geva eitt búskaparligt íkast, sum er oman fyri hundrað milliónir krónur. Harafturat vita vit nú, hvør serliga vitjar Føroyar og hvørji áhugamál tey hava.

Hetta skuldi givið ferðavinnuni møguleikar fyri at ýta neyvari av, og leggja ta kós, sum í longdini skuldi givið mest av sær. Sjálvandi skulu vit royna at fáa fleiri ferðafólk til landið - og eisini skulu vit royna at fáa tey at koma fyrr og seinri á ári - men vit mugu fyrst og fremst kunna skapa fleiri og betri tilboð. V. ø. o. skulu vit hugsa um dygdina bæði í tænastum og tilboðum. Hóast ferðafólk sum heild eru nøgd, er enn nógv sum haltar og kundi verið betri.

Nú skal nýggjur stjóri setast fyri Ferðaráð Føroya. Undanfarnu stjórar hava fingið stovnin at koyra rættiliga væl og harafturat eru fleiri átøk gjørd. T. d. seinasta kanningin hjá granskingardeplinumá Bornholm, marknaðarkanningin, skipanin við kunningarstovunum, tí føroyska ferðafaldaranum og onnur tiltøk við. Hetta skuldi givið tí komandi leiðaranum eitt gott støði at arbeitt víðari á.

Men tá hetta er sagt, so má Vinnumálastýrið eisini syrgja fyri, at skipanin við Ferðaráðnum verður í samljóð við ta nýggju stýrisskipanarlógina. Út frá einum leikmanna sjónarmiði tykist sum um, at lóg og reglur um Ferðaráðið við einum stýri, sum hevur rættiliga stórt vald - eisini yvir stjóranum - ikki er í samljóð við stýrisskipanina. Men tað eiga løgfrøðingar at meta um. Og koma teir til somu niðurstøðu, so má skipanin broytast til eitt ráðgevandi ráð. Enn er Ferðavinnan í eini uppbyggingartíð, men nú er prógvað, at hon kastar nakað av sær, so nú má hon fáa ein tjans at menna seg upp aftur meiri.

***Sosialurin***




*Morten Fauerby og Lars Bo Kirk. Aftanfyri síggjast rullandi redaktiónirnar hjá Sosialinum og Jyllandspostinum*
**Jens Kristian Vang**

# Jyllands-Posturin rullaði í Føroyum

EIRIKUR LINDENSKOV

Í síðstu viku sást bilur hjá Jyllands-Posten rulla kring oyggjarnar. Tað vóru teir báðir, myndamaðurin Morten Fauerby, og blaðmaðurin Lars Bo Kirk, sum vóru komnir til Føroya eftir »positivum søgum«, sum teir málbóru seg. Lars Bo Kirk kennir væl Føroyar, tí hann hevur ættarbond hendanvegin. Omman er úr Oyndarfirði, dóttir Jústines Eidesgaard úr Oyndarfirði.

Jyllands-Posturin hevur havt eina rullandi redaktión, JP Explorer, sum hevur koyrt kring heimin. Hetta gav teimum hugskotið at senda eina líknandi redaktión á ferð í Danmark – sum aftur gav hesum báðum starvsfeløgunum hugskotið at »rulla« til Føroya eftir »øðrvísi« søgum.

— Vit settu okkum tvinnar treytir, áðrenn vit fóru: Vit skuldu ikki tosa við serfrøðingar og ikki við politikarar. Hetta var tað einasta, sum lá fast, greiðir Lars Bo Kirk frá yvir ein kaffimunn, tá hann vitjaði í blaðhúsinum á Argjum fríggjadagin.

– Vit vóru troyttir av øllum teimum negativu søgunum, sum vit hava hoyrt úr Føroyum seinastu árini. Tá eg sjálvur havi verið her fyrr og kenni landið, so fekk eg hugskotið til hesa ferðina, sigur hann.

Talan var um eina »discountferð«, greiða teir frá. Teir nógvu pengarnir vórðu ikki settir av til túrin. Teir hava ein gamlan vørubil, har teir fáa sovið - hóast teir fleiri nætur flýddu inn á sjómansheimið, tí tað var so kalt at sova í bilinum, siga teir.

Teir hava útgerð við, so teir fáa latið tilfarið til blaðið beinleiðis frá bilinum. Við eini farteldu, eini fartelefon og einum digitalum myndatóli fáa teir sent myndir og tekst beinleiðis til blaðhúsið í Jyllandi.

Teir vóru væl nøgdir við førningin, teir fingu við sær. Tá teir vitjaðu á Sosialinum høvdu teir júst verið í Gásadali, har teir høvdu fylgt postmanninum - og skriva áhugaverda søgu um tað. Annars høvdu teir vitjað á Margarinfabrikkini í Havn, har teir hittu ungdómin, á politistøðini í Havn, har teir m. a. hava hitt ein dana, ið sum hálvur føroyingur hevur funnið sær starv í Føroyum. Tá teir fóru higani løgdu teir til brots inn á Skálafjørðin til føroyskan dans, sum var at lesa og síggja í Jyllands-Postinum mánadagin. Til bar eisini at hoyra dansin á heimasíðuni hjá Jyllands-Postinum mánadagin.

# Sámal og Jóhannes konsert í Havn og Runavík

EIRIKUR LINDENSKOV

Kunningarstovan í Eysturoy boðar frá, at Konsertfelagið skipar fyri konsert við Sámal Petersen og Jóhannes Andreassen verður í býráðshøllini í Runavík kvøld klokkan 20:30.

Sunnudagin klokkan 16 verður seinna konsertin við teimum báðum í Læraraskúlahøllini í Havn.

Á skránni á konsertunum eru verk frá barokktíðini, m. a. eftir Bach og Händel.

Sámal Petersen, sum er 35 ára gamal, hevur gingið á musikkskúla í Wien í Eysturíki og Odense. Hann hevur undirvíst í violin síðani 1995 - og undirvísir hann eftir kendu Susuki skipanini. Sámal er konsertmeistari hjá Føroya Symfoniorkestri og spælir við vælkenda kamarorkestrinum, Aldubáruni.

Jóhannes Andreassen hevur eisini gingið á musikkskúla í Wien í Eysturríki. Eisini hevur hann lisið í London. Í eitt trý ára skeið hevði Jóannes um hendi klaverfylgispæl við musikkskúlan í Kópavági í Íslandi. Hann hevur við jøvnum millumbilum síðani 1986 undirvíst í klaverspæli í Musikkskúla Føroya. Eins og Sámal spælir Jóhannes eisini við Aldubáruni.

Báðir hava teir eisini havt fleiri framførslur uttanlands og verða roknaðir sum tveir av okkara dugnaligastu tónleikarum.





*Sámal Petersen og Jóhannes Andreasen hava konsert í Runavík í kvøld og í Havn sunnudagin*



# Uppsagnirnar skulu nú takast aftur

*– Nú skal Suðuroyar Sjúkrahús hava meiri pening, tí samgongan skilir, at sparitiltøkini, sum eru sett í verk, bera als ikki til, sigur Hergeir Nielsen*

ÁKI BERTHOLDSEN

– Eg kann veita vissu fyri, at uppsagnirnar á Suðuroyar Sjúkrahúsi verða tiknar aftur.

Sigur Hergeir Nielsen, løgtingsmaður úr Suðuroynni.

Hann er einsamallur suðuroyingur í samgonguni.

Og vit hava spurt hann, um hann ætlar at gera nakað fyri at hjálpa Suðuroyar Sjúkrahúsi burturúr teimum trupulleikum, tað er komið í, eftir at tað ikki fekk nokk av peningi til at varðveita raksturin á sama støði sum í fjør.

Fyribils avleiðingarnar eru í stuttum, at fýra størv eru niðurløgd.

Harðast er fysioterapiin rakt, har øll tann ambulanta viðgerðin verður niðurløgd.

Í fjør gingu 263 fólk til ambulanta viðgerð.

Somuleiðis er ein teknikari uppsagdur og sostatt er ongin at gera tól aftur, sum fara aftaná vanliga arbeiðstíð. Harumframt eru eisini aðrar sparingar framdar.

Og harafturat er eitt fólk sagt upp í leiðbeiningini og 1/2 í køkini.

### Verða tiknar aftur

Hergeir Nielsen sigur, at síðani tað kom fram, at tað bleiv neyðugt við sparingum á Suðuroyar Sjúkrahúsi, hevur hann arbeitt av kraft saman við samgongan fyri at finna eina loysn.

Og hann sigur, at samgongan skilir, at tær sparingarnar, sum eru settar í verk, bera ikki til.



*– Niðurlegging kemur ikki upp á tal. Antin hava vit eitt sjúkrahús, sum er á sama støði sum í dag, ella hava vit onki, sigur Hergeir Nielsen*

Og tí kann hann siga útfrá síni bestu sannføring, at tað verða ongar uppsagnir á Suðuroyar Sjúkrahúsi í ár

– Tær uppsagnir, sum longu eru sendar, verða tískil eisini tiknar aftur.

– Tí tað kann ikki góðtakast, at so nógv fólk skulu svíða, bara tí at tað er neyðugt at spara nakrar hundraðtúsund krónur, sum tað nú er talan um.

Í øllum førum kann hann longu veita vissu fyri, at fysioterapiin og tekniska deild verða ikki skerd, tí tað gongur beinleiðis útyvir tænasturnar til sjúklingin.

– Tað kemur ikki uppá tal at tann ambulanta fysioterapiin verður niðurløgf og at tekniska deild skal skerjast so at ongin skal vera at gera tól aftur aftaná arbeiðstíð.

### Royna at útvega pening

Løgtingsmaðurin sigur, at í løtuni verður arbeitt við at útvega pening til at raksturin á Suðuroyar Sjúkrahúsi kann halda fram óbroyttur í ár.

Men enn er ov tíðliga at siga nakað um, hvar peningurin skal finnast.

Tó vísir hann á, at tá ið fíggjarkarmarnir upprunaliga vórðu lætnir teimum ymsu aðalstýrinum í sambandið við fíggjarlógina fyri í ár, fekk almanna og heilsumálastýrið 115 milliónir eyka.

– Og tað er í hesum 115 milliónunum, at tað má bera til at finna tær fáu hundraðtúsund krónurnar, sum skulu til fyri at varðveita trygdina og tænastuna á Suðuroyar Sjúkrahúsi, sigur Hergeir Nielsen.

Men hann leggur afturat, at tað er ikki loyvt at flyta pening ímillum ymisk rakstrarstøð, so eyðvitað skal løgtingið eisini upp í málið.

Hann veit ikki, nær málið verður loyst. Men tað verður í næstu framtíð og í øllum førum verður tað áðrenn uppsagnirnar, sum eru settar í verk, koma í gildið.

– Men tað er harmiligt, at fólk skulu liva í óvissu hesa tíðina, leggur hann afturat.

### Visti onki

Annars skilir Hergeir Nielsen ikki rættiliga, hví Suðuroyar Sjúkrahús er komið í hesa støðuna.

–Tá ið landsstýrið legði uppskotið til fíggjarætlan fram, varð víst á, at starvsfólkatalið á Suðuroyar Sjúkrahúsið bleiv varðveitt.

– Og so seint sum eina viku, áðrenn fíggjarnevndin skrivaði álitið til fíggjarlógina, fekk eg at vita, at tað fekk ongar avleiðingar fyri Suðuroyar Sjúkrahús.

– Ei heldur fingu vit nakra sum helst ábending aðrastaðni frá um, at hetta fór at føra sparingar við sær.

– Eg fekk eisini at vita frá Helenu Dam á Neystabø, at sjúkrahúsið fekk fult endurgjald fyri lønarhækkingarnar.

Hann vísir samstundis á, at av teimum trimum sjúkrahúsinum var tað Suðuroyar Sjúkrahús, sum fekk tað størstu hækkingina.

### Óvguliga óheppið

Hergeir Nielsen sigur, at tað er ógvuliga óheppið fyri tingræðið, at tað ikki ber til at líta á teir upplýsingar, sum landsstýrið leggur fyri tingið.

Og hann ætlar sær nú at kanna, hvar í skipanini tað er, at tað haltar og hvar í brekini eru, so at tað verður bøtt um hetta til eina aðru ferð.



# Fyrioterapeutar mótmæla uppsagnum á Tvøroyri

Í tíðindasendingini kl. 18.30 í gjárkvøldið bar útvarpið tey tíðindi, at ætlanin er at siga tveimum fysioterapeutum á Suðuroyar Sjúkrahúsi upp.

Tað undrar okkum sum fakfelag at frætta slíkt gjøgnum fjølmiðlarnar, tí eftir § 18 í sáttmálanum millum Fíggjarmálastýri og Føroyskar Fysioterapeutar stendur greitt, at ætlaðar uppsagnir skulu fráboðast Føroyskum Fysioterapeutum skrivliga, soleiðis at felagið og setanarmyndugleikin (tygum) kunnu royna at sleppa undan ætlaðu uppsagnunum.

Hetta kunnu vit bara staðfesta, at tygum ikki hava gjørt í hesum føri. Hetta er brot á sáttmálan, sum vit ikki óátalað kunnu lata fara aftur við borðinum.

Vit skulu tí við hesum harðliga átala ta framferð, ið hevur verið nýtt í hesum máli, við vón um, at slíkt ikki endurtekur seg.

Føroyskir Fysioterapeutar mótmæla við hesum fráboðaðu uppsagnunum av fysioterapeutum á Suðuroyar Sjúkrahúsi.

**Tórshavn 15. januar 2000**
**Føroyskir Fysioterapeutar**

# Dan býráðsformaður á Tvøroyri

*Dan Nielsen verður býráðsformaður á Tvøroyri til Páll Vang kemur fyri seg aftur*

Nú hevur Dan Nielsen tikið við sum býráðsformaður á Tvøroyri. Og tað starvið skal hann røkja til valdi býráðsformaðurin, Páll, Vang kemur aftur.

Tað var á fundi mánadagin, at Tvøroyrar Býráð umskipaði seg. Samtykt varð, at næsti maður á samgongulistanum tók sæti í býráðnum fyri Páll Vang.

Tað er Finnleif Guttesen, sum sostatt nú er komin í Tvøroyrar Býráð.

Samstundis tekur varabýráðsformaðurin, Dan Nielsen, við sum býráðsformaður. Finnleif Guttesen tekur nú sæti í teimum nevndum, sum Dan Nielsen hevur verið í. Talan er um teknisku nevnd, mentamálanevnd, vinnunevnd, brunanevnd og ferðslunevnd, og tær skipa seg nú av nýggjum.

Dan Nielsen arbeiðis í Føroya Banka, men haðani fer hann í farloyvi frá 1. februar fyri verða býráðsformaður fulla tíð.

Alt hetta er ein avleiðing av, at valdi býráðsformaðurin, Páll Vang bleiv brádliga illa sjúkur á jólum: Hann er í viðgerð á donskum sjúkrahúsi og útlit eru til, at tað gongur nakað av tíð, áðrenn hann verður arbeiðsførur aftur.

*–Áki–*



CAR OF THE YEAR – FOCUS 1999

**P/f Wenzel**
***Bjóðar røttu brúktbilaloysnina til rætta prísin. Goymslan er á tremur við hágóðskubilum til nógv niðursettar prísir***

# Brúktir bilar

| Merki: | Skrás.: | Km.: | Prísur: |
|---|---|---|---|
| Ford Fiesta 1,8 Diesel | '91 | 101.000 | 49.000,- |
| Ford Escort 1,6i CLX | '95 | 85.000 | 84.000,- |
| Ford Escort 1,6i CLX | '95 | 45.000 | 89.000,- |
| Ford Escort 1,6i CLX | '95 | 48.000 | 89.000,- |
| Ford Escort 1,8D | '95 | 123.000 | 99.000,- |
| Ford Escort 1,8D 3 H. | '95 | 44.000 | 99.000,- |
| Ford Escort XR3i | '87 | 153.000 | 25.000,- |
| Citröen 1,6i ZX 5 H. | '91 | - | 59.000,- |
| Ford Fiesta 1,25i | '96 | 13.000 | 83.000,- |
| Ford Fiesta 1,3i | '96 | 28.000 | 83.000,- |
| Ford Escort 1,4i CLX | '95 | 20.000 | 64.000,- |
| Ford Fiesta 1,25i | '96 | 36.000 | 89.000,- |
| Ford Mondeo 1,8i | '93 | 180.000 | 90.000,- |
| Ford Escort 1,6i | '97 | 62.000 | 94.000,- |
| Ford Fiesta 1,8D | '97 | 35.000 | 94.000,- |

Kom út til okkara - vit finna bilin, ið tær dámar!
Góður avsláttur, um eingin býtisbilur er.
Vit eru altíð til at snakka við

**P/f Wenzel**
**www.wenzel.fo**
Akranesgøta 5 - FO 100 Tórshavn - Tlf. 313873 - Fax 311173

Sosialurin - 311820